GJALDSTOVAN

# ÚTBJÓÐINGARSKRIV

## Rammusáttmáli fyri kaffi

# Innihald

1.0 Rammusáttmáli fyri kaffi ... 3
1.1 Yvirskipað ... 3
2.0 Treytir ... 3
2.1 Yvirskipað ... 3
2.2 Longd av sáttmálaskeiði ... 4
2.3 Sáttmálatreytir ... 4
3.0 Krøv ... 4
3.1 Mongd ... 4
3.3 Innlatan av tilboði ... 5
4.0 Umsiting ... 5
5.0 Tilgongdin at finna ein veitara ... 5
5.1 Samráðingar og sáttmáli ... 5
5.1 Fyrivarni og minstakrøv ... 6
5.2 Viðgerð av innkomnum tilboðum ... 6
5.3 Meting ... 6
5.5 Tillutan av sáttmála og endi á útboði ... 8

# 1.0 Rammusáttmáli fyri kaffi

## 1.1 Yvirskipað

Gjaldstovan vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan at bjóða upp á at fáa rammusáttmála fyri kaffi til allar landsins stovnar.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrir upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Útboðstilfarið er sett saman av:

- Útbjóðingarskriv
- Prísur frá veitara, excel
- Fylgiskriv 1 – yvirlit yvir stovnar
- Fylgiskriv 2 – Trú og heiður váttan.

Útboðstilfarið kann heintast á www.keypsportal.fo.

# 2.0 Treytir

## 2.1 Yvirskipað

Landsins stovnar keypa fleiri ymisk sløg av kaffi, og uppgerð frá Gjaldstovuni vísir at stovnar landsins keypa út við 12 tons av kaffi, sum er meira enn 16 milliónir koppar av kaffi. Við kaffi meinast malið kaffi í posum ella pakkum og kaffibønir.

Hesin rammusáttmáli hevur til endamál at skipa innkeypið betri og fáa besta prísin til landsins stovnar.

Ætlanin er at gera fimm rammusáttmálar, har landsins stovnar kunnu velja millum hvønn tey brúka.

- Fyrsti sáttmálin er fyri kaffi, sum landsins stovnar keyptu mest av í 2025. Tað kaffi stovnar keyptu mest av í fjør var Merrild.
- Seinni er fyri kaffi, sum landsins stovnar keyptu næstmest av í 2025. Tað kaffi stovnar keyptu næst mest av í fjør var Karat.
- Triði sáttmálin er fyri tað bíligasta kaffi. Her vektar prísur mest, men skal hava ein rímiligan smakk av kaffi.
- Fjórði sáttmálin er har góðskan og smakkurin á kaffi hevur størsta týdning, men tó fyri ein rímiligan kostnað.
- Fimti sáttmálin er fyri kaffibønir, sum fevna breitt

Tað ber til hjá einum veitara at vinna fleiri sáttmálar.

### 2.2 Longd av sáttmálaskeiði

Keyp Landsins ynskir at gera eitt ára sáttmála.

Veitarin og Gjaldstovan eru heimilað at siga hendan sáttmála upp við skrivligari fráboðan við eini freist á tríggjar mánaðir til sáttmálaenda seinast í einum mánaði. Er talan um týðandi mishald, kann sáttmálin sigast upp við styttri freist, í stendur mát við mishald.

### 2.3 Sáttmálatreytir

Talan er um ein sjálvbodnan rammusáttmála fyri landsins stovnar.

Tað merkir, at allar vørur í hesum útboðinum eru sjálvbodnar hjá stovnum at keypa. Hetta merkir, at stovnar kunnu keypa vøru frá øðrum veitara.

Gevið tó gætur, at kaffivørurnar í útboðnum fevna um 80 prosent av teimum kaffivørum, sum landsins stovnar keyptu í 2024.

## 3.0 Krøv

### 3.1 Mongd

Landsins stovnar keyptu kaffi fyri 1,3 milliónir krónur í fjør. Í alt keyptu stovnarnir umleið 9.200 kilo av malnum kaffi og 2.250 kilo av kaffibønum.

Keyp landsins førir eftirlit um stovnar landsins fylgja hesum rammusáttmála, og Keyp landsins hevur tulkingarrætting, um stovnar landsins skulu keypa eftir sáttmálanum.

### 3.2 Prísir

Veitarin verður biðin um at upplýsa:

Prís fyri 1 kg av Merrild kaffi.

Prís fyri 1 kg av Karat kaffi.

Prís fyri 1 kg av valfríum kaffi, har prísur vektar 70 prosent og góðska 30 prosent.

Prís fyri 1 kg av valfríum kaffi, har góðska vektar 50 prosent og prísur 50 prosent.

Prís fyri 1 kg av kaffibønum har góðska vektar 50 prosent og prísur 50 prosent

Prís fyri útkoyring fyri ordrar undir 1.000 krónur.

Prís fyri útkoyring fyri ordrar yvir 1.000 krónur.

Við í útboðnum er prísskjal, sum veitarin skal útfylla.

## 3.3 Innlatan av tilboði

Tilboð skal latast inn talgilt til Keypsportalin á fylgjandi teldupostadressu: keypsportal@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt. Freistin at lata inn tilboð er: fríggjadagin 28. august 2026 kl 12.

Tilboð, ið verða latin inn eftir hesa freist, verða ikki viðgjørd.

# 4.0 Umsiting

4.1 Rokningar og upplýsing

Stovnarnir og veitarin samskifta beinleiðis. Stovnar rinda sjálvir fyri síni keyp. Keyp landsins á Gjaldstovuni hjálpir fegin, um ivamál eru.

Upplýsingar um rammusáttmálar við prísi og treytum verður lagdar út á keypsportal.fo – har bert stovnar landsins hava atgongd.

Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-sml format. Veitarin, sum vinnur útboðið, bindur seg til at lata Keyp landsins upplýsingar um sølu hjá stovnum landsins, tá Keyp Landsins umbiður hesar.

Gjaldstovan hevur tørv á at fáa upplýst hvussu stór árlig sparing er í mun til vanligan listaprís. Hendan upplýsing er ikki neyðug í sjálvum tilboðnum, men kann koma aftaná.

# 5.0 Tilgongdin at finna ein veitara

## 5.1 Samráðingar og sáttmáli

Tað verður ein dómsnevnd við Almannaverkinum, Fróðskaparsetur Føroya og Keyp landsins á Gjaldstovuni, sum tekur avgerð um rammusáttmáli verður gjørdur við veitara, sum letur tilboð inn.

Vit ætla ikki, at tað skal verða nakað samráðingarumfar. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella príssamráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum, har allar treytir í útbjóðingartilfarinum eru við.

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

## 5.1 Fyrivarni og minstakrøv

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaður til at seta skrivligar spurningar, um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

Tilboðsgevarar kunnu ikki hava skuld til tað almenna, vísandi til galdandi reglur.

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5.2 Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 5.3 Meting

Sáttmálin verður tillutaður í tráð við ásettu tillutanartreyt. Metingin av innkomnu tilboðum tekur støði í fylgjandi undir tillutanartreytum:

- Fyri pakkarnar við Merrild kaffi vektar prísur 100 prosent.
- Fyri pakkarnar við Karat kaffi vektar prísur 100 prosent.
- Fyri tað fyrra valfría kaffi, vektar prísur 70 prosent og góðska 30 prosent.
- Fyri tað seinna valfría kaffi vektar góðska 50 prosent og prísur 50 prosent.

- Fyri kaffibønir vektar góðska 50 prosent og prísur 50 prosent.

a. Prísur 100 %

Tann, sum bjóðar eina vøru, sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum hevur bíligasta samlaðan prís uppgjørdur har allir kostnaðir eru íroknaðir, fær fult stigatal. Dýrari vøra fær lutfalsliga færri stig.

*Dømi*

Ein veitari hevur bjóðað kaffi fyri ein samlaða kostnað upp á kr. 20.000 og ein hevur bjóðað kaffi fyri samlaða kostnað upp á kr. 30.000.

Bíligasti fær fult - 100%. Hin fær kr. (20.000/30.000)*100 =66,6 %

b. Prísur 50 %

Tann, sum bjóðar eina vøru, sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum hevur bíligasta samlaðan prís uppgjørdur har allir kostnaðir eru íroknaðir, fær fult stigatal. Dýrari vøra fær lutfalsliga færri stig.

*Dømi*

Ein veitari hevur bjóðað kaffi við einum samlaðum kostnað á kr. 20.000 og ein hevur bjóðað kaffi fyri samlaða kostnaðin á kr. 30.000.

Bíligasti fær fult - 50%. Hin fær kr. (20.000/30.000)*50 =33,3 %

c. Góðska 50%

Við góðsku verður vektað soleiðis:

Smakkur og aroma – 50 %

- Rundleiki í smakki
- Beiskleiki / sýra
- Eftirsmskkur
- Aroma

Skipað verður fyri blindsmakking fyri at meta um hetta. Veitarar skulu tí levera vøruroyndir av hesum kaffinum, tá tilboð verða latin inn.

Kaffi til blindsmakkingina verður gjørt við eini industrikaffimaskinu.

Eins og við prísi fær tann, sum bjóðar eina vøru, sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum skorar best í blindtestini, fult stigatal. Stigtalvan er 1 til 10. Verri góðska fær lutfalsliga færri stig.

## 5.5 Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Sáttmálin verður tillutaður, tá ið útbjóðari hevur valt tilboðið.

Útbjóðari er ikki bundin til at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær rættin til at strika útboðið.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari verður noyddur at strika útboðið.

| Virksemi | Dato, klokkutíð |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | Mánadagin 24. august kl 12.00 |
| Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1. | Fríggjadagin 28. august kl 12.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | 01. oktober |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur av Rana

Fulltrúi